# Øssur Winthereig er talsmaður teljaranna



Kontanti og til tíðir nasadjarvi journalisturin Øssur Winthereig hevur fingið nýtt starv. Í longri tíð hevur hann verið sjálvstøðugur eftir at hann gavst í Kringvarp Føroya. Men í dag, 1. apríl, er hann byrjaður í starv sum kunningarráðgevi hjá Fólkateljingini undir Hagstovu Føroya. – Eg havi leingi verið áhugaður í hagtølum, og tá eg sá henda møguleikan, søkti eg, sigur Øssur Winthereig. Hann leggur dent á, at tað mangla nógv hagtøl um øll viðurskifti í samfelagnum, og at tað tí hevur týdning at kunna um tað arbeiðið, ið nú skal byrja. - Mítt starv verður fyrst og fremst at kunna um hvønn týdning fólkateljingin og innsavnanin av hagtølum hevur. Harnæst verður tað at geva Fólkinum tølini aftur, so tey kunnu nýtast sum grundarlag til at gera betri lógir og til nýggja gransking, sigur Øssur Winthereig.

# fyllir 40




*Anna Brimnes hevur verið bókavørður í Býarbókasavninum síðan 1975. Størsta kollveltingin var tá teldurnar komu í 1998. Tá fóru fólk at nýta bókasavnið á ein øðrvísi hátt, sigur hon. Úrvalið hjá Býarbókasavninum er víðkað til umfram bøkurnar at fevna um ljóðbøkur, tíðarrit og dvd filmar. Er ein óhjálpin, ber til at fáa bøkurnar til dyrnar, við at gera brúk av Bókaberanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

bók, men í staðin at taka bøkur niður av netinum ella at gera brúk av ljóðbókunum. Hetta merkir bókavørðurin á Býarbókasavninum einki til.

– Tað koma fleiri útgávur enn nakrantíð á marknaðin. Tað kann ongantíð í verðini gerast ómodernað at lesa, hvørki úr eini bók ella á netinum, tí tað er jú ein fyritreyt, sigur Anna Brimnes.

Hóast nógvar vitjanir á Býarbókasavninum, veit Anna Brimnes, at tey eru mong, ið ikki vita hvar Býarbókasavnið er.

– Eg vil fegin hava, at Býarbókasavnið er fólksligt, og at tað er fyri øll. Sum er, koma fólk í øllum aldri á bókasavnið. Barnabókasavnið verður til dømis væl vitjað av børnum, ið koma við dagstovnum ella foreldrum. Og júst okkara barnabókasavn, eri eg glað fyri, og haldi eg tað riggar ótrúliga væl, sigur Anna Brimnes.

## Vil styðja høvundum

Í samband við 40 ára føðingardagin hjá Býarbókasavninum vera ymisk tiltøk í bókasavninum. Í dag byrjar dagurin við morgunkaffi í Tjóðpallinum, og millum klokkan 15-17.00 í dag verður móttøka í hølunum hjá Býarbókasavninum, har Býarbókasavnið bjóðar kaffi við onkrum søtum afturvið. Samstundis letur framsýning upp, sum lýsir arbeiðið hjá Býarbókasavninum hesi seinastu 40 árini. Seinni í mánaðinum vera tiltøk í Býarbókasavninum (sí skrá aðrastaðni á síðuni) har upplestur verður fyri børnum, og skriviverkstaðir verða fluttir í Býarbókasavnið.

– Mín dreymur er styðja og hjálpa teimum, ið skriva, og vísa áhuga fyri tí, tey gera. Sum er, hava vit ikki rættiliga umstøðurnar til tað. Men nú fáa vit at síggja hvussu føðingardagstiltøkini eydnast, áðrenn vit kunnu gera nakað meir við tað, sigur bókavørðurin í Býarbókasavninum í Havn.

## Føðingardagsskrá hjá Býarbókasavninum

**6. apríl kl. 14.00 vitjar teknarin Janus á Húsagarði á barnabókasavninum. Hann fer at tekna saman við børnum í aldrinum 3-10 ár. Úrslitið verður seinni sýnt fram á Býarbókasavninum.**

**Janus hevur millum annað skrivað og myndprýtt barnabókina “Ferðin hjá Mosamollis”, og eisini hevur hann gjørt føðingardagsplakatina, sum fæst fyri 60 kr. á bókasavninum frá 1. apríl.**

**21. apríl kl. 16.00 fer Rakel Helmsdal at siga frá um tað at skriva, og smáar skrivivenjingar eru partur av tiltakinum. Hesin dagurin er ætlaður teimum ungu, men onnur eru eisini vælkomin.**

**22. apríl kl. 10.00 fer Rakel Helmsdal at lesa upp úr barnabókunum um Lítla Skrímsl og Stóra Skrímsl.**

**24. apríl kl. 14.30-17.30 verður bókmentaligur arbeiðsdagur á bókasavninum. Sólrún Michelsen, Carl Jóhan Jensen og Oddvør Johansen flyta hendan dagin síni arbeiðspláss á Býarbókasavnið, og tey fara at sita hvør í sínum rúmi og skriva. Øll eru vælkomin at tosa við rithøvundarnar, geva teimum hugskot og spyrja til arbeiðslagið hjá teimum.**

